**hjá Pidda**
*á Toftum*

## Raskur leiðari til handilin hjá Pidda

Handilin hjá Pidda á Toftum sóknast eftir dugnaligum leiðara. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum til rætta persónin

Hjá Pidda hevur leingi verið álitið hjá toftafólkum, og handilin leggur stóran dent á at nøkta tørvin á øllum gerandisvørum til kappingarførar prísir.

Sum leiðari hjá Pidda fært tú fulla ábyrgd av handlinum. Tú varðar av søluni, innkeypinum og fíggjarstøðuni, og tú skalt leiða arbeiðið hjá 12 ídnum fólkum.

Vit sóknast eftir einari eldsál, sum er til reiðar at taka eitt eyka tak, tá ið tað er neyðugt. Tað er umráðandi, at tú ert raskur og varðveitir yvirlitið, hóast nógvar uppgávar skulu loysast.

Útbúgving innan handilsvinnuna eingin treyt, men hinvegin er tað ein fyrimunur, um tú kanst vísa okkum á viðkomandi royndir.

Ljóðar hetta sum tú? Send so eina skrivliga umsókn innan 1. februar til:

**P/f Vørður**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1048
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til David Nordendahl á telefon 213550 ella teldupost david-n@post.olivant.fo






# Til sølu

Hvítur Toyota Corolla 2.0 diesel, árg. 11/2002. Bert koyrt 39.700 km.

**Food Service**
Fo-700 Klaksvík
Tlf. 458484 · Fartlf. 215124


# Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir pedagogum bæði til vøggustovu og barnagarð at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu. Møguleikar eru eisini fyri parttíðarstarvi. Á stovninum eru 2 vøggustovur 3 barnagarðsstovur og ein stova við 6 ára gomlum børnum.

Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.30 til 17.00.

Dagstovnurin er ein sjálvsognarstovnur við eini 5 manna nevnd, har trý eru politiskt vald og tvey eru foreldraumboð.

**Umhvørvið rundanum Dagstovnin á Argjum**
- Beint við er hagin við alskyns møguleikum
- Sandá rennur framvið, og Sandagerð er tætt við
- Bussleið 2 steðgar við stovnin

**Stovnurin leggur dent á at bjóða**
- Ein pedagogik, har dentur verður lagdur á menning og avbjóðing
- Virðing og trivnað, bæði hjá børnum og vaksnum
- At stovnurin er opin og jaligur um framtíðina og broytingar
- Forskúla og gott samstarv við skúlan

**Hví trívast starvsfólkið á stovninum**
- Tí at vit fáa fakliga mennandi avbjóðingar
- Tí at vit sjálvi eru við til at seta dám á stovnin
- Tí at arbeitt verður við virðum, dygd og menning

**Hvat kunnu vit bjóða tær**
- Eitt starv har tú kanst hava ávirkan
- Eitt starv har tú kanst nýta tínar dygdir og samstundis menna teg sjálva(n)
- Eitt starv har vit líta á teg, so tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Eitt starv har dentur verður lagdur á opinleika

**Krøv til tín**
- At tú ert námsfrøðingur
- At tú hevur fakliga vitan, sum kann nýtast í dagliga arbeiðinum
- At tú trívist við at arbeiða sjálvstøðugt
- At tú hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert framfýsin

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstiganum frá 10 til 16.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019 ella at ringja 319019 lokal 10.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 18. februar 2006. kl. 12.00